## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men támut veður. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og møguliga regn ella vátaslettingur eitt skifti, annars sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og ælingur sunnudagin, annars sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.

– – –

Í februar var avfallið undir miðal, 83,6 mm, móti 114,7 mm. Hitin var um miðal – 4,1° móti 3,7°

# Brandur gjørdi vart við seg

**Sunnukvøldið sang Brandur Enni til eitt stórt undirhaldstiltak í Keypmannahavn, og hann var so sannførandi, at danska Ekstrablaðið brúkar nógv pláss upp á hann í blaðnum mánadagin**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Leygarkvøldið var eitt stórt undirhaldsshow á skránni í Falkoner Teatrinum í Keypmannahavn. Eugen Tajmer, sum er veitarin av undirhaldi til danir, hevði sítt árliga tiltak, har hann vísti fram, hvat hann hevur at bjóða.

Fleiri enn 2000 fólk, sum fáast við undirhald í Danmark, vóru til staðar, og á pallinum vóru kend nøvn – alt frá Amin Jensen til Kim Sjøgren og Jette Torp.

Føroyski sangarin Brandur Enni hevði eisini fingið møguleikan at syngja ein sang, og tað gjørdi 14 ára gamli tvørámaðurin sannførandi.

Í øllum førum var tað hann, sum Ekstrablaðið fyrst og fremst beit merki í. Blaðið skrivar mánadagin um tiltakið, og har snýr tað mest seg um poppstjørnuna úr Føroyum.

**Umrøða ger mun**

Ekstrablaðið heldur, at Brandur Enni er sjarmerandi, og at hann dugir at syngja. Nú ætlar hann sær at vinna gentuhjørtuni í Danmark.

Danska blaðið greiðir eisini frá bakgrundini hjá Brandi í Føroyum, hvussu hann byrjaði at syngja, og hvussu hansara útgávur hava selt hópin av eintøkum bæði í Føroyum og í Íslandi, har hann eisini hevur ein fjepparaskara.

Tað mesta av einari síðu verður brúkt til Brand Enni, og tað er slíkt, sum kann gera veruligan mun, tá ið royndt verður at fáa hann fram uttanlands. Tað er trupult at fáa gjøgnumbrot, um fjølmiðlarnir ikki sýna tær ans.

Spurningurin er nú, hvat Brandur kann fáa av ítøkiligum fyrispurningum um framførslur í Danmark.



*Brandur Enni er til reiðar at vinna nýggjan fjepparaskara í Danmark, skrivar danska Ekstrablaðið*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷20 |
| Nuuk | ÷15 |
| Qaqortoq | ÷9 |
| Ammassalik | ÷6 |
| Saint John's | ÷3 |
| Halifax | ÷3 |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 7 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 15 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 1 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 26 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1042 hPa. yvir Suður-Skandinavia fer eystureftir og mennist. Vestan fyri hátrýstið rekur køld luft av landsynningi móti Føroyum.




Hátrýstið yvir Finlandi stendur mestsum í stað. Lágtrýstið yvir Atlantshavinum á 52N-31V fer spakuliga í landnyrðing og dýpist, so landsynningsvindurin heldur við.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/03 kl. 06⁰⁰– 09/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,8°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 08/03 kl. 06⁰⁰–09/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 14,4 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

6. mars: Fullmáni
12. mars: Mánin næstur jørðini
13. mars: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. mar | 08.57 | 21.18 | 07.57 | 20.18 | 08.12 | 20.33 | 10.57 | 23.18 | 11.57 | — | 07.12 | 19.33 | 06.12 | 18.33 | 09.12 | 21.33 | 10.12 | 22.33 | 08.42 | 21.03 | 09.57 | 22.18 |
| 11. mar | 09.42 | 22.07 | 08.42 | 21.07 | 08.57 | 21.22 | 11.42 | — | 00.18 | 12.42 | 07.57 | 20.22 | 06.57 | 19.22 | 09.57 | 22.22 | 10.57 | 23.22 | 09.27 | 21.52 | 10.42 | 23.07 |
| 12. mar | 10.32 | 23.14 | 09.32 | 22.14 | 09.47 | 22.29 | 00.07 | 12.32 | 01.07 | 13.32 | 08.47 | 21.29 | 07.47 | 20.29 | 10.47 | 23.29 | 11.47 | — | 10.17 | 22.59 | 11.32 | — |
| 13. mar | 11.56 | — | 10.56 | 23.40 | 11.11 | 23.55 | 01.14 | 13.56 | 02.14 | 14.56 | 10.11 | 22.55 | 09.11 | 21.55 | — | 12.11 | 00.29 | 13.11 | 11.41 | — | 00.14 | 12.56 |

5 707265 100036 >